## Larry King durvaði



Kendi amerikanski sjónvarpsmaðurin, Larry King hjá CNN, fekk heiðurin av at verða hin fyrsti, sum gjørdi samrøðu við hotelarvingin Paris Hilton, eftir at henda var latin leys aftur. Hon hevði sitið inni í 23 dagar fyri at hava koyrt við ógyldigum koyrikorti. Men tann ein tíma langa samrøðan á CNN í gjárkvøldið var so keðilig, at sjálvt spyrjarin sjálvur mundi durva viðhvørt. So nú er betur skiljandi, at Paris Hilton fyri tað mesta letur seg avmynda – uttan at siga nakað.

## Doyði í Disney-land

Ein 14-ára gomul genta doyði í Disney-land í París í gjár. Franska løgreglan kannar í løtuni orsøkina til, at unga gentan kundi doyggja í rusjibananum. Familjan var komin úr Sparina at virja kenda frítíðarstaðið, men tá rusjibanin steðgaði varnaðust vinir hjá gentuni, at hon sat lívleys í vogninum. Læknar á staðnum royndu at fáa lív aftur í gentuna, men til fánýtis. Banin er nú stongdur, til funnið er fram til, hvat hendi 14-ára gomlu gentuni.

# Gjómaður laðar kráir



*Felagið Gjómaður er áhugafelag við tí endamáli at varðveita alt gamalt við Gjógv*

Savnsmynd

**Leygardagin skipar áhugafelagið Gjómaður fyri aktivari útferð á Gjáarskarð, har ætlanin er at laða gamlar kráir og gróthús uppaftur**

FORNMINNI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri hálvum ári síðani – í januar mánað – varð áhugafelag sett á stovn, nevnt Gjómaður. Hetta er felag, hvørs endamál er at varðveita alt gamalt í og við Gjógv.

Í fyrsta umfari er talan um tað, sum stendur úti, serliga garðar, kráir, gróthús og opnahjallar.

Hetta fyrsta hálva árið hevur felagið mest fingist við at skipa seg og fáa arbeiðið í gongd. Limatalið liggur longu um teir 60, og hetta uttan at felagið hevur gjørt nakað sum helst aktivt fyri at útvega nýggjar limir.

Nú er felagið so klárt at fara undir rættiligt virksemi, og fyrsta tiltakið verður nú leygardagin, tá ætlanin er at skipa fyri einari sonevndari aktivari útferð.

– Vit fara at møtast í Gjáarskarði, har ætlanin er at endurlaða onkrar av teimum eitthundrað torvkráunum, sum eru í økinum, sigur Hans Andrias Djurhuus, sum er formaður í Gjómanni.

Málið er í ár at fáa minst tvær kráir laðaðar upp av nýggjum og eitt av gomlu gróthúsunum. Men eisini teir mongu niðurdotnu opnahjallarnar ætlar felagið at endurreisa. Teir eru allir niðurdotnir, men í felagnum vita tey um, hvar teir hava staðið.

### Hugnaligur leygardagur

Í lýsing í lýsingartorginum í Sosialinum heitir felagið á fólk um at møta talsterk á Gjáarskarði leyardagin. Heitt verður á fólk um at hava amboð við, so sum spaka, hjólbøru og spann.

Ætlanin er sum nevnt, at dagurin skal skipast sum ein blanding av útferð og arbeiði, og um viðrar, er ætlanin at grilla pylsur eisini.

Hans Andrias Djurhuus leggur dent á, at tiltakið avgjørt ikki er fyri limir eina, men øll, ið hava hug, eru vælkomin at taka lut.

– Endamálini eru tvinni. Annað er at vita, hvussu stórur áhugi er millum fólk at fáa hesar kráirnar og gróthúsini laðað upp aftur, tað vil siga, hvussu nógv fólk møta upp til tiltakið, og hitt er, at vit skulu hava tað stuttligt saman við at varðveita tað gamla. Tað skal á ongan hátt kennast sum nakað slag av tvangi, sigur Hans Andrias Djurhuus.

At laða gomlu garðarnar, kráirnar, gróthúsini og opnahjallarnar upp aftur er so summaraktiviteturin. Um veturin er ætlanin at fáa fatur á gomlum myndum og fáa skrásett tær, bæði sum myndasavn og ikki minst at skráseta, hvør er á myndunum.

Sum skilst á formanninum, so eru ógvuliga nógv fólk áhugað í at fáa varðveitt alt tað gamla, sum hevur við Gjógv at gera, og hóast felagið ikki ennn hevur hvørki fíggjarliga orku ella hølisumstøður, so er væl hugsandi, at Gjómaður við tíðini eisini gerst eitt rættiligt fornminnisfelag, har fólk kunnu lata inn fornar lutir, sum hava tilknýti til Gjógv.

Men fyribils verður útferðin leygardagin fyrsta stigið á hesi leiðini. Kunngjørt verður seinni, nær og hvar fólk skulu møta.

# Umhvørvið á breddan

**Orku- og Umhvørvisnevnd Norðurlandaráðsins heldur í ár regluliga summarfundin í Føroyum. Nevndin er her inntil fríggjadagin, og í gjár var fundast, meðan nevndin í dag vitjar í Eysturoynni**

UMHVØRVI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Umhvørvisnevndin kom í Vágarnar týsdagin 26. juni og fór beinleiðis við bussi til Oyragjógv, haðani farið varð við báti undir Vestmannabjørgini. Seinni um kvøldið var Jógvan Arge og Tórshavnar Býráð vertur við ein døgurða í Muller´s pakkhúsi.

Mikudagin varð nevndarfundur, har Jákup Vestergaard, landsstýrismaður, greiddi frá umhvørvismálum, eins og Poul Michelsen løgtingsmaður luttók á fundinum umboðandi Rættarnevndina, ið hevur umhvørvismál í løgtinginum. Tíðindafundur var á Hotel Føroyum í gjár, har Asmund Kristoffersen, Bogi Hansen og Kári P. Højgaard luttóku.

Aftaná vórðu fyrilestrar av Boga Hansen um klimabroytingar, Sigurd í Jákupstovu um oljuleiting og orku og Pál Weihe um tungmetallir í grind og spiki.

Um kvøldið varð bjóðað til buffet á Náttúrugripasavninum, har føroyska umboðið í Umhvørvisnevndini var vertur. Aftaná greiddi Dorete Bloch á ein sera livandi hátt frá grindahvali og grindadrápi, og gjørdi frágreiðingin sítt til at opnað eyguni á grannum okkara fyri, hví vit halda áfram við hesi aldargomlu mentan.

### Vitja Eysturoy

Í dag er ferðalagið heildagstúr inni í Eysturoynna. Fyrst verður vitjað á vatnorkuverkinum hjá SEV á Eiði, har Klæmint Weihe greiðir frá. Eisini verður ein kunning um alduorkukraftverk (Seawaves).

Vitjað verður á høvdavirkinum í Leirvík, har Eirikkur á Húsamørk greiðir frá. Høvdavirkið er serstakt, tí tað framleiðir úr høvdum og ryggjum´frá slógvi, og hetta gevur eitt gott ískoyti til útflutning okkara. Virðisøkingin er áleið 60 mió í útflutningsvirði árliga, og orkan brúkt verður, kemur frá brennistøðini, altso avlopsorka, ið annars hevði farið út í luftina og ongum gagna.

Ein stuttur túrur verður gjørdur gjøgnum undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar. Síðan verður farið á bátasavnið í Leirvík, har Ossi greiðir frá. Aftaná verður vitjað í sunnara parti av Eysturoynni í Runavíkar og gjøgnum Nes Kommunu. Endað verður við einum føroyakvøldi í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum, har Hans J. Lamhauge borgarstjóri, vegna Runavíkar Kommunu, er vertur.



*Kári P. Højgaard, limur í Umhvørvisnevnd Norðurlandaráðsins, og Asmund Kristoffersen, formaður í somu nevnd*

*Mynd: Jans Kristian Vang*